# Eivør við á mentanarnátt í Reykjavík



*Eivør Pálsdóttir skal syngja á mentanarnáttini í Reykjavík um vikuskiftið. Millum tey, ið skulu syngja eru eisini Bjørk, Bubbi, megas og Bill Bourne úr Canada*

**Mentanarnátt Reykjavíkar fór av bakkastokki um vikuskiftið og eitt av stóru nøvnunum var Eivør Pálsdóttir og Bill Bourne. Onnur luttakandi vóru t.d. Bjørk, Bubbi og Megas**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen,*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Fyri 9. ferð fór tiltakið Mentanarnátt Reykjavíkar fram um vikuskiftið. 250 mentanartiltøk av ymsum slag fóru fram og størstu nøvnini innan íslendskan tónleik vóru við. Millum luttakandi nøvnini vóru Bjørk, Bubbi, Megas og Eivør Pálsdóttir og Bill Bourne úr Canada.

Miðlarnir hava gjørt nógv nurtur úr Eivør og DV hevði stóra samrøðu við Eivør. Væntandi er, at Eivør og Bill Bourne geva eina fløgu út seinni í ár.

Eivør kemur í samrøðuni inn á sínar røtur í Føroyum, í Gøtu, og hon vísir ikki aftur, at hon umframt síni ár í Íslandi, eisini fer at halda til í øðrum fremmandum landi, men sambært samrøðuni verður tað ikki Danmark. Hon staðfestir, at har trívist hon ikki og at hon ynskir Føroyar loystar frá Danmark.

Eivør skrivar í løtuni tónleik til sangleikin Úlfshamssaga. Maria Ellingsen leikstjórnar. Hon er væl kend. Hon er hálvur føroyingur og hálvur íslendingur.

Eivør og Bill Bourne fara á tónleikaferð í Noreg og skulu tá eisini spæla fyri norska konginum.

Nakað av tí seinasta, ið hendi á mentanarnáttini var, at Bubbi spældi saman við gamla bólki sínum, Egó. Bólkurin byrjaði í 1982 og helt á í tvey ár. Hesi bæði árini vóru teir best dámdi bólkur í Íslandi. Fólk hava spent bíðað eftir hesi sameining og løgreglan metti, at eini 100.00 høvdu leitað sær at lurta. Hetta er met, tí gamla metið hevði bólkurin Stuðmenn og taldi fjøldin tá 80.000 fólk, sigur heimmildarmaður okkara í Íslandi, Jens Guð.




## Drupu springarar uttan loyvi

Leygardagin drupu nakrir mans springarar uttan loyvi. Løgreglan skal geva loyvi at drepa springara, og tá seks springarar vórðu sæddir uttan fyri Borðoyarvík leygardagin, metti løgreglan, at loyvið skuldi ikki gevast.

Hetta tóku umbiðjararnir ikki til eftirtektar, men hildu kortini springararnar til. Einir 20 mans vóru á vágni, men ikki allir vóru við í drápinum.

Løgreglan gav monnunum eina kraftiga átalu. Vakthavandi sigur, at hendir slíkt aftur, so verður sektað. Vakthavandi sigur orsøkina til noktandi svarið vera, at springaradráp skaðar okkara umdømi, og at ongin orsøk er til, at halda so lítlan flokk til.

Teir seks springararnir vórðu bert býttir í drápspartar.

### Brutu rútar

Rútar vórðu brotnir í tveimum bilum mánamorgunin í eystur- og miðbýnum í Havn. Annars verður boðað frá einum sera friðarligum vikuskifti frá øllum løgreglustøðum kring landið. Av Sandi frætta vit, at ómetaliga nógv fólk var í oynni leygardagin vegna góða veðrið, men annars eitt tað mest friðarliga vikuskiftið í longri tíð.

*-hkm*



# Eingin Bjarnatænasta

**Tað eydnaðist ikki at birta lív í kjakið um føroyskan orku- og umhvørvispolitikk í Norðurlandahúsinum fríggjadagin. Til tess var neyðugt at Bjørn Lomborg og føroyska pallborðið tosaðu sama mál-og tað gjørdu tey ikki**

LOMBORG Í FØROYUM
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Hittinorðaði danin, Bjørn Lomborg, prógvaði fríggjadagin, at hann er frálíkur fyrilestrarhaldari. Hóast meginparturin av fyrilestrinum var bygdur um turr hagtøl, varð fyrilesturin ongantíð tungur at lýða á.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Hann tosaði og reyvin gekk. Eitt fullsett Norðurlandahús sá fríggjadagin ein vælupplagdan og undirhaldandi Bjørn Lomborg greiða frá sínum sjónarmiðjum um orku og umhvørvi. Hittinorðaði danin er ein royndur fyrilestrarhaldari, og hóast meginparturin av fyrilestrinum hjá Lomborg var bygdur um turr hagtøl, varð fyrilesturin ongantíð tungur at lýða á.

Bjørn Lomborg dugdi væl at taka dømi úr gerandisdegnum fyri lýsa síni sjónarmið. Uttan mun um tú ert samdur við boðskapinum hjá honum, skert ikki burtur, at Lomborg er áhugaverdur at lurta eftir, og hetta tóktist eisini verða niðurstøðan hjá fleiri av áhoyrarunum, tá fólk um fimmtíðina leitaðu sær í forhøllina eftir fyrilesturin. Kortini vantaði nakað í Norðurlandahúsinum fríggjadagin.

### Lítið bit í

Tað var landsstýrismaðurin í orkumálum, Bjarni Djurholm, ið hevði boðið Bjørn Lomborg til Føroya at geva sítt íkast til framtíðar orku- og umhvørvispolitikk í Føroyum. Eitt pallborð við Poul Arna Jacobsen, Jógvan Mørkøre, Johnny í Grótunum og Boga Hansen setti Bjørn Lomborg spurningar eftir fyrilesturin.

Veruligt bit kom ongantíð í samskiftið millum føroyska pallborðið og Lomborg, tí partarnar høvdu ilt við at tosa sama mál. Spurningarnir frá pallborðinum fevndu rættiliga breitt. Lomborg var biðin um at hava eina støðu til alt frá pengum til herðnaðardubbing kontra umhvørvi, framtíðin hjá Golfstreyminum, føroyska monopolið á orkuøkinum og føroyska luftdálking

Sum áhoyrari tóktist spurningarnir ofta verða óskipaðir, og hetta hevði við sær, at kjakið millum føroyska pallborðið og Lomborg gjørdist tamt. Føroyska pallborðið royndi eisini at fáa danan at taka støðu til átrokandi spurningar um føroyskan orku- og umhvørvispolikk, men tað kom týðuliga til sjóndar, at Bjørn Lomborg kendi lítið til føroysk viðurskifti, og tí helt hann seg aftur at svara spurningum.

### Spell

Tað er gleðiligt, at landsstýrismaðurin í orkumálum hevur tikið stig til at orða ein framtíðar orku- og umhvørvispolitikk fyri Føroyar. Orka- og umhvørvi eru økið, ið fylla nógv í samfelagskjakinum í flestu londum, men í Føroyum hava vit havt ilt við at fáa glið á kjakið.

Bjarni Djurholm segði seg vóna, at fyrilesturin hjá Lomborg fór at verða startskotið á kjakinum um orku og umhvørvi í Føroyum, men hetta eydnaðist ikki veruliga. Tá fyrilesturin var av fríggjadagin sat tú við eini ørkymlandi kenslu.

Gamaní vart tú blivin greiður yvir, hvat Lomborg stendur fyri, men spurningurin, hvat hann ítøkiliga skal nýtast til í føroyska kjakinum, stendur framvegis ósvaraður.

Hetta er eitt sindur spell, tí endamálið við at bjóða Lomborg til Føroya var at birta lív kjakið um føroyska orku- og umhvørvispolitikk.

### Drúgvar royndir

Bjørn Lomborg vísti fríggjadagin, at hann hevur verið í mongum orðadráttum um síni umstríddu sjónarmið á orku- og umhvørvisøkinum. Hann hevur millum annað verið í væl umtóktu kjaksendingini HARDtalk á BBC.

Føroyska pallborðið royndi at seta Lomborg upp á pláss, men danin var sannførandi og skjótur at svara aftur. Við sínum eyðkenda hittinorðaða stíli kom Bjørn Lomborg ongantíð veruliga í trupulleikar í Norðurlandahúsinum. Hann hevur óivað fingið somu spurningarnar aftur og aftur, og aftursvarini kennir hann sum sín egna lumma.

